

## Datt á Føroyaferð

Danski sangarin, Stig Rossen, var úti fyri óhappi á eini Harley Davidsen, tá hann herfyri hevði konsert í Føroyum. Danska Ekstra-Blaðið skrivar, at Stig Rossen hevði stytt sær stundir við at koyra á motorsúkklu kring Føroya Land. Eftir at hava koyrt 115 kilometrar, gekk tó galið, og í fallinum meiðslaði hann ryggin nakað. Rossen hevur tó verið í pallið í Danmark síðani hetta, men eitt nú segði hann fyri áhoyrarunum í Vejle Musikteater, at andlitsbráð hansara ikki stavaði frá teimum kenslum, sum hann legði í sangin, men snøgt sagt komst av, at hann hevði nógva pínu.

# hálvan blokk



umleið tey somu í hinum skipanunum.

Tann fimtingurin, sum er eftir, eru sjófólk, sum sigla antin sum dekkarar og maskinfólk, umframt, at eini 10-12 prosent sigla í øðrum størvum, sum ikki eru greitt tilskilaði í kanningini.

Í mun til sjófólk úr øðrum londum undir somu skipanum, eru føroyingar rættiliga óvanligir. Tað eru nevniliga lutfalsliga óvanliga nógvir maskinmeistarar og navigatørar, sum er føroyingar.

Taka vit til dømis filipinar og danir, sum eru størstu bólkarnir í DIS-skipanini, so eru umleið 50 prosent av dønunum og umleið 16 prosent av filipinarunum navigatørar og maskinmeistarar.

Dømini eru tikin frá uppgerð í DIS frá 30. septembur 2008, sum er fyri, hvussu nógv vóru umborð henda dag.



*Skipara- og Navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið hava tikið stig til hesa kanning, sum Magni Laksáfoss, búskaparfrøðingur, og Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, hava gjørt*




*Fýra av fimm føroyingum, sum sigla undir DIS-skipanini eru yvirmenn. Hetta er nógv í mun til onnur lond. Til dømis er annar hvør danir og fimti hvør filippinari yvirmaður*




*Føroyingar sigla undir fleiri ymiskum altjóða skrásetingum, men meira enn helvtin sigla undir tí donsku. Ein triðingur siglir undir tí norsku, meðan restin í kanningini siglir í Grønlandi og Kanada*




*Inntøkan frá avgjøldum er omanfyri 68 milliónir krónur. Góðar 37 milliónir krónur koma í skatti og avgjøldum frá avleiddum virksemi. Umleið 111 milliónir krónur stava frá inntøkum av almennum virksemi og 17 milliónir frá avleiddum virksemi av almenna virkseminum. Hetta legst afturat 320 milliónum í nýtslu í fyrsta umfari og 8,5 milliónum í skatti í fyrsta umfari. Hetta gevur til samans omanfyri 600 milliónir krónur í samlaðum árini á búskapin*

## Stóran týdning í niðurgongd

Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, sum saman við Magna Laksáfoss, búskaparfrøðingi, hevur gjørt kanningina av føroyskum sjófólki í øðrum londum, er sannførdur um, at tað er sera gevandi fyri Føroyar í niðurgangstíðum, at vit hava sjófólk, sum kunnu fara út í heim at vinna sær pening, samstundis sum tey búgva í Føroyum.

– Fyri føroyska samfelagið sum heild, hevur tað øgiliga stóran týdning, at vit hava havt eina sovorðna mentan og tradition at fara út í heim at sigla, sigur Dennis Holm, eftir at hann hevur greitt frá, at tað serliga er í niðurgangstíðum, at nógvir føroyingar sigla uttanlands, og tí hjálpir tað til dømis nógv upp á arbeiðsloysi.

Sambært Dennis Holm eru fleiri orsøkir til, at tað eru so nógvir føroyingar, sum sigla uttanlands.

– Eitt er tað, at tað eru hampiliga góðar lønir, sum yvirmenn fáa aðrastaðni. Men hin parturin er eisini tann, at skipanirnar eru broyttar, soleiðis, at tú sum einstaklingur fær eitt nógv betri arbeiðslív. Tað vil siga, at tú ert burtur eitt tíðarskeið og heima eitt tíðarskeið, og tí hevur møguleika fyri at hava eitt gott familjulív, samstundis, sum tú hevur eitt arbeiðslív, sigur Dennis Holm.

-eij